Viðmerking

# Tillukku



Býráðið samtykti hóskvøldið, at Tórsgøta 21 — Gamli Føroya Banki — framyvir skal nýtast til teir eldru borgararnar í kommununi, og at Tilhaldið fær brúksrættin til ávís høli í bygninginum. Eg taki av fullum hjarta undir við, at okkara eldru fáa fyrsta rætt til bygningin, og at Tilhaldinum verður tryggjað rímulig hølisviðurskifti. Kortini haldi eg ymiskt vera óheppið. Samtyktin var ógreitt orðað. Spurnartekin kann setast við málsviðgerðina. Og orðaskiftið í býráðnum var avsporað.

Lat meg taka tað síðsta fyrst. Í býráðssalinum sótu eini 50 eldri medborgarar. Tað er ein borgararættur at vera til staðar á opnum býráðsfundi, og er tað bara gleðiligt, at áhugin er stórur. Tíverri haldi eg, at politikkararnir lótu seg merkja av hesum, tí eitt skilagott orðaskifti fekst ikki í lag. Hvørki um orðaljóðið í samtyktini ella um mannagongdina. Eingin ivi er um, at tað ávirkaði, at eitt býráðsval stendur fyri durum.

Tað sigur seg sjálvt, at eitt tilmæli frá mentamálanevndini átti at ligið í málinum. Nevndin varðar av Kvøldskúlanum, sum hevur innivist í bygninginum. Men lat tað fara, tí niðurstøðan hevði helst verið tann sama. Hetta hóast Kvøldskúlin er í sera trongum skóm hølum viðvíkjandi.

Mest av øllum harmar tað meg tó, at samtykt býráðsins var so ógreið: “Trivnaðarfyrisitingin mælir til, at avgerð nú verður tikin um, at húsini í Tórsgøtu 21 burturav verða brúkt til gagns fyri tey gomlu í Tórshavnar kommunu. Til hølistrupulleikarnir hjá Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla eru endaliga loystir, verður mælt til, at Tilhaldið fær brúksrættin til kjallarahæddina, miðhæddina og eitt hampuligt rúm á 1. hædd til teldu- og lesistovu”.

Hetta var orðaljóðið í innstillingini. Sosiala nevnd tók undir við tilmælinum 19.9, Fíggjarnevndini 28.9 og nú til síðst Býráðið á fundinum 5.10. Eftir mínum tykki átti tilmælið at verið “redigerað”.

Onkur vil kanska kalla tað orðkloyvarí, men hvat varð í veruleikanum samtykt? Tað kann ikki vera, at býráðið hevur samtykt, at “Trivnaðarnevndin mælir til _”. Um vit skera inngangin burtur, ljóðar næsta tulkingarroynd: “Býráðið samtykkir, at avgerð nú má takast _” . Hetta merkir, at býráðið ikki enn hevur tikið ta endaligu avgerðina - neyvan var tað meiningin. Loyva vit okkum at skera uppaftur meir, fáa vit samtyktina: “Býráðið avger, at Tórsgøta 21 _”.

Ávísir tulkingarmøguleikar eru sostatt, og tað er óheppið. Afturat hesum kemur so spurningurin, um tað eru tey eldru ella Tilhaldið, sum hava fingið tillutað bygningin. Hesin munur kann hava avgerandi týdning.

Seinna helvt er greiðari. Har verður sagt, hvørji høli Tilhaldið hevur brúksrætt til. Orðið “brúksrættur” er tó eitt løgið orð í hesum sambandi. Tí tað er burturvið at tosa um, at Tilhaldið fær brúksrættin til ávísan part av bygninginum, um tað er Tilhaldið, sum “eigur” bygningin. Her átti at staðið, hvat Kvøldskúlin hevur brúksrætt til.

Onkur av teimum, sum hjástødd vóru á býráðsfundinum, kundu fingið varhugan av, at eg var ímóti samtyktini. So var ikki. Samtyktin var einmælt. Eg helt bara, at ymisk viðurskifti kundu verið greiðari. Fyrst og fremst samtyktin. Men sum onkur býráðslimur tók til: “Vit vita jú, hvat vit meina”. Og tað mugu vit so vóna. Livst so spyrst.

Enn eina ferð: Hjartaliga tillukku við bygninginum.

**Klæmint Olsen**
**býráðslimur**

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**
**www.sosialurin.fo**

# Ein svørt komedia!

*Leikárið 2000-2001 er byrjað hjá Grímu á Gamla Meiaríi, og tað verður lagt út við einum nýggjum leiki hjá einum nýggjum høvundi*



*Í kvøld byrjar leikárið hjá Grímu við einum sigandi írskum leiki*

Martin McDonagh er ikki fyltur tretivu enn, men fimm leikir hevur hann aftan fyri seg longu – og harav tveir, sum hava vunnið virðislønir. Annar teirra er *Krypilin úr Inishmaan,* sum verður sýndur fyrstu ferð á Gamla Meiarínum leygarkvøldið 7. okt. kl. 19.00.

Leikur fer fram á pinkalítlu oynni Inishmaan við vesturstrond Írlands. Útlongsul, sleyg og slatur, beistagerðir og hjálpsemi eru partar av gerandisdegnum í lítlu bygdini. Men gerandisdagurin verður vendur upp og niður, tá teir knappliga koma úr Hollywood at gera film á grannaoynni!! Hvør sleppur fyrst framat at verða filmstjørna? Tann vakra Helen, slagsbróðurin Babbybobby, slatrikellingin Johnnypateenmike, ella kanska krypilin Halti Billy…??? Hugsar onkur um *Barbaru* ?? – ja, tað er kanska ikki heilt skeivt...

Írland hevur leingi staðið á heimskortinum sum sjónleikaland, og fleiri írskir leikir eru eisini syndir í Føroyum. Høvundin Mc Donagh brýtur kortini upp úr nýggjum. Hann gongur ikki til sjónleik, sigur hann. Filmurin hevur størri áhuga, og sum íblástur nevnir hann m.a. Quentin Tarantino og Martin Scorsese – og tað er sanniliga bæði svartur humor, beinraknir persónar og eitt sløð av harðskapi at vænta sær. Og kanska fer onkur at lippa eitt sindur eisini... um tey leita sær oman á Meiaríið.

Leikurin verður sýndur í oktober og so leingi sum fólk koma. Sýningar verða týsdag, mikudag og hósdag kl. 20.00, og leygardag og sunnudag kl. 16.00.

Tað er Eyðun Johannesen, sum bæði leikstýrir og ger pallin. Leikarar eru: Egi Dam, Páll Danielsen, Kristina Hansen, Hallur Hjalgrímsson, Jógvan Salomon Joensen, Adelborg Linklett, Birita Mohr, Hans Tórgarð og Ria Tórgarð.

Lesarabræv

# Ríkissjúkrahúsið, einaferð enn

Havi bíðað eftir, at onkur fór at verja sjónarmiðini hjá Oddvør Johansen, ið herfyri skrivaði um, at vit í Føroyum sjálvi gjalda fyri viðgerð á Ríkssjúkrahúsinum (R.S.), men einastu viðmerkingar, ið eru at síggja í bløðunum, eru álop og ósannindi frá javnaðarmonnum.

Teimum dámar nevniliga ikki, at vit føroyingar skulu gjalda nakað sjálvir, betur dámar teimum olmussuna frá dønum.

Nú er tað soleiðis, at eg arbeiði sum sjúkrasystir á Landssjúkrahúsinum (L.S.) og tí síggi eg av og á brøv, ið eru skrivað av yvirlækna á L.S. til R.S., tá sjúklingar verða sendir niður á R.S. til viðgerðar.

Øll brøvini byrjað við: »Der er stillet kaution for...« og so navnið á sjúklinginum og hví hann verður sendur niður – so vissuliga gjalda vit sjálvi. At vit so fáa blokkstuðul úr Danmark er ein onnur søga.

Annars havi eg hug at nevna, at vit í alt ov stóran mun bert hyggja at R.S. Tað eru sjúkrahús í øðrum londum, sum kunnu og eisini gjarna vilja geva okkum líka so góða og í summum førum betri viðgerð enn vit fáa á R.S. Eg veit um fólk, sum hava ligið á sjúkrahúsi í Íslandi og í Aberdeen í Skotlandi, sum hava verið stak væl nøgd við viðgerðina, tey hava fingið. Sjálvi hava vit frá mínari deild sent sjúkling til Aberdeen, tí tað var skjótari enn til Danmarkar – bert ein tími við flogfari, og har skuldi handlast skjótt, tað eydnaðist tíbetur væl, serliga væl lótu tey avvarðandi at teirri umsorgan og hjartablídni, tey fingu har.

Eisini kann nevnast, at heilsustovnurin hjá ST – WHO – hevur mett um heilsuverkið í heiminum, og har liggur Danmark í botninum millum lond í vesturheiminum, so vit hava onki at missa við eisini at søkja okkum heilsubót í hinum grannalondunum hjá okkum.

Tað er harmiligt, at politikarar og onnur, ið skriva í bløðunum, eru so blindað av partapolitikki, at tey ikki klára at halda seg til sannleikan, og í minsta lagi royna at vera objektiv í sínari skriving.

Tað er í lagi, at vit eru ósamd um samband og loysing, men, vælsignaði tit, roynið og skrivið satt.

Vinarliga

**Katrin Egholm Isfeld**



Viðmerkingar

# Góði borgari í Havn, í Hoyvík, á Hvítanesi, í Kaldbak, á Argjum, í Norðradali, í Syðradali og í Kollafirði

Tú skalt tann 21. november avgera, hvør skal stjórna Tórshavnar Kommunu næstu fýra árini, og eg eri ein teirra, sum bjóði meg fram sum títt umboð.

Vanliga kemur landspolitiska flokksbýtið lítið til sjóndar í kommunalpolitikki, men Tóshavnar Kommuna er vorðin so stór, at serliga búskaparliga stevnuskrá politisku flokkanna ofta týðiliga kemur til sjóndar í kommunalpolitiska arbeiðinum.

Eg bjóði meg fram saman við Sambandsflokkinum.



Flokkurin er ein liberalur, borgarligur flokkur, sum búskaparliga byggir sína stevnuskrá á, at eitt gott úrslit hjá einstaklinginum kemur øllum samfelagnum til góða. Tann sunna ábyrgdarkenslan hjá tí einstaka er treytað av, at tann einstaki sleppur at vísa, hvat hann dugir.

Í farna valskeiði hevur Sambandsflokkurin átt 2. varaformannin í býráðnum. Flokkurin mátti taka um stýrisvøl og stýra skútuni gjøgnum valskeiðið, uttan at eg skal nýta nógv orð um hetta. Vit fingu gongd á býráðsarbeiðið aftur og framt mong mál, m.a. býarplanin og fleiri mál á mentanarliga, sosiala og fíggjarliga økinum.

Tí blunka vit ikki við at geva borgaranum tað lyfti, at um fýra ár verður Tórshavnar Kommuna undir okkara leiðslu eitt enn betur stað at búgva í við uppaftur betri trivnaði, bara vit fáa ta ávirkan, vit ynskja.

**Heðin Mortensen**
**býráðslimur**
og valevni til býráðið
Heimasíðan:
www.hemorten.com

# Søgan og gamla Havnin

Havnin er ein hugnalig kulla. Tað er stuttligt at ganga í havnargøtum og hugaligt at ferðast í tí gamla býarpartinum millum Eystaru vág og Vestaru vág. Tíbetur hevur tað eydnast Tórshavnar Kommunu at varðveita mong av teimum gomlu húsunum og smogurnar í Gongini, úti á Reyni, á Bakkhellu og harumvegir.

Hevði kommunan ikki havt so hepna hond at bøta um, hevði hesin fyrr so lívligi og spennandi býlingur verið rotnaður og brotnaður niður. Hann hýkur væl og virðiliga uppi enn og er eitt virðismikið íkast til trivnaðin, men kanska er nakað deydligt har úti í dag. Har kundi verið meiri lív.

Tað er í lagi, at fólk hava fingið nøkur av húsunum at búgva í. Tað tryggjar eitt ávíst lív og hugna, men til tess, at eitt rættiligt lív skal vera har, er neyðugt at brúka summi av húsunum til annað enn bústaðir. Tað kann hóskandi verða gjørt á tann hátt, at fólk og feløg fáa møguleika fyri at skipa fyri virksemi í húsunum, sum standa tóm.



Har kann onkur café latast upp við møguleika fyri tónleiki. Har kann gerast ein matstova ella fleiri, og hví ikki loyva eini fittari ølstovu í sjálvum Ydun, har teir bryggjaðu og drukku øl í farnum tíðum?

”Tað surrar ein fluga í Ydun í dag”, yrkti skaldið Christian Matras á sinni um ein strævnan mánadag í Ydun. Flugurnar kundu kanska farið at surra aftur; nú saman við ófyribeindum vespum.

Søvn kunnu eisini vera í gomlu Havnini. Tórshavnar Býráð hevur ikki rættiliga fingið um endan, tá tað snýr seg um at vísa fram og lýsa býarsøguna og landssøguna.

Grannarnir í Íslandi eru fleiri rossalongdir frammanfyri okkum. Tú kemur ikki til tann minsta bei, sum ikki hevur eitt áhugavert savn um fólk og vinnuvegir sínar. Mangt og hvat er varðveitt í Havn, men fáur veit um tað, og so at siga ongin sær tað.

Ydun kann hýsa bryggjara- og bakarasavninum, prentsmiðjusavnið kann vera í teimum gomlu húsunum hjá Bókhandlinum í Gongini, elektriska savnið í húsunum hjá Wellejus, embætismannasavnið í einum gomlum embætismannahúsum, almugusavnið í einum sethúsum ella fleiri o.s.fr.

Fara vit heilt út á Tinganes, sum framvegis hoyrir til Havnina, skuldi onki verið til hindurs fyri, at eitt savn, sum lýsir tann Kongliga Einahandilin úti í Havn, fær innivist í onkrum av bygningunum, sum handilin var í, nú umsitingin kortini er farin út um allan býin.

Tí søgan hevur stóran týdning - bæði sum ræðumynd og kveikjari.

**Jógvan Arge**
**valevni tjóðveldisfloksins**
**til Tórshavnar Býráð**

# Væl á veg at røkka málinum

*Tað hevur gingist munandi betri enn ætlað at skapa tilboð um barnagarðspláss í Tórshavnar Kommunu*



Fyri fýra árum síðani samtykti býráðið, at tað fór at taka okkum10 ár til øll børn millum 0 og 10 ár kundu fáa tilboð um barnagarðspláss. Vit ætlaðu at skapa 30 nýggj pláss um árið.

Komandi ár verða heili 80 nýggj pláss klár at taka í nýtslu. Og umframt hesi plássini, verður fyrsti barnagarðurin hjá eini fyritøku í býnum eisini klárur at taka í nýtslu komandi ár. Hesin stovnur kemur at rúma umleið 30 børnum. Hesi plássini eru øll til børn undir skúlaaldur.

Her sæst eitt yvirlit yvir plássini, sum vit fram til næsta ár hava megnað at skapt síðani 1. januar 1996

| | |
|---|---|
| Útibarnagarðurin Spíran | 20 børn. |
| Barnagarðurin inni á Gøtu | 42 børn. |
| Útbygging av Býlingahúsunum | 80 børn. |
| Uppnormering á Argjum | 10 børn. |
| Uppnormering í Lítlaskóg | 16 børn. |
| Uppnormering av Dagrøktini | 60 børn. |
| Útibarnagarður í Gundadali | 15 børn. |
| Ùtibarnagarður á Hvítanesi | 14 børn. |
| Barnagarðurin í Vesturbýnum | 60 børn. |
| Útibarnagarður í SSBhúsinum | 20 børn. |
| Barnagarður hjá eini fyritøku | 30 børn. |

**Tilsamans:**
**367 børn afturat í 5,5 ár - ella 67 børn um árið**
+ Frítíðarskúlin 250 børn 6 - 7 ár

Vit í Javnaðarflokkinum fara framhaldandi at arbeiða fyri, at øll børn í Tórshavnar Kommunu skulu fáa ansingarpláss. Bíðilistin skal burtur.

Fyri okkum er treytin fyri einum livandi býi, har fólkið og vinnulívið mennist og trívist, at rúm er fyri øllum. Vit skulu hava rúm fyri okkara smæstu borgarum, eins og øllum øðrum. Børnini skulu virðast og hava sama rætt, sum øll onnur. Fyri okkum vaksnu er tað at fáa arbeiði ein sjálvfylgja. Tað skal eisini vera ein sjálvfylgja hjá børnunum at fáa mennandi barnagarðstilboð.

Fyri at nøkta tørvin krevst ein politiskur vilji. Vilji til at seta pening av og at bjóða øllum borgarum góð kor at liva og vaksa upp í. Atkvøð fyri einum livandi býi, atkvøð fyri Javnaðarflokkinum.

**Elin Lindenskov, býráðslimur**
**Valevni Javnaðarfloksins**
www.lindenskov.com
elin@lindenskov.com

Lesarabræv

# Alternativ bygging: 1–0 til Jógvan við Keldu

Tað er ikki við sørum kenslum ein skrivar enn einaferð um tørvin at fáa bygdar alternativar bústaðir til eitt nú eldri her í høvuðsstaðarumráðnum.

Tá eg hoyrdi tíðindini í Útvarpinum, at nú er skøtil settur á at fara undir slíka bygging í Klaksvík, má eg siga at støðan í løtuni stendur **1 — 0 til Klaksvíkina og Jógvan við Keldu**.

Tað verða ikki smávegis lovorð, sum uppstillaðu valevnini fara at koma við, nú val er í nánd, **og fari eg enn einaferð at heita á ØLL tykkum at taka henda spurningin upp í valstríðnum.**

Eitt er so hvat ein lovar skal gerast, men er tað sjálvandi mest umráðandi, at tað verður lagt til brots við eini miðvísari ætlan, hvussu hesin spurningurin verður loystur.

Tað mugu kunna finnast skilagóðar loysnir, sum bara skulu umsetast til verkætlanir.

Eg sjálvur eri ikki sørt argur um, at tað ikki var farið undir hetta í kreppuárunum, fyri at prísirnir kundu haldast niðri á einum støði, sum hevði gjørt slíka bygging kostnaðarliga á einum lægri støði, enn tað allarhelst kann gerast fyri í dag — men tað nyttar sjálvandi ikki at hyggja í bakspegli.

Jógvan nevndi, at byggingin var stíla til fólk frá 55 ára aldri, sum eg haldi er sera skilagott, tí her er talan um eitt umhvørvi, har tann einstaki skal trívast og kann byggja sær eitt otium upp saman við javnaldrandi.

**Eisini til tey ungu**

Fyrr havi eg nevnt, at talan ikki er bert um tørvin hjá teimum eldru, men eisini at tey ungu hava møguleika fyri at koma í eina íbúð heldur enn at tey eru noydd at fara í dýr sethús, har prísurin í flestu førum fer upp um milliónina.

**Tey ungu lesandi**

Sum vitiligt er, eru nógvir av lestrarstovnunum her í høvuðsstaðnum, men eru bústaðar-møguleikarnir hjá teimum ungu langt frá tí, sum høvuðsstaðurin kann og eigur at liva við – **her má gerast nakað ítøkiligt beinanvegin.**

**Húsalánsgrunnurin**

Nú um dagarnar varð nevnt, at ávíst stríð hevur tikið seg upp millum peningastovnarnar og Húsalánsgrunnin viðvíkjandi rentuni, sum eg sjálvandi ikki vil leggja meg útí, men vil bert senda enn eina áheitan til tykkum í grunninum um at fara undir tær ætlanir, sum tit hava lagt fram herfyri – **eitt er víst, at tørvurin á alternativari bygging er og verður stórur frameftir**.

Gott val øll somul!

**Fríðálvur Jensen**

*Tíðinaskriv frá Ferðslutrygd*

# Nú koma kunngerðirnar frá Vinnumálastýrinum

Vinnumálastýrið gjørdi fríggjadagin vart við, at nýggjar kunngerðir og broytingar í sambandi við ferðslulógina koma nú. Í oktober kemur ein vegleiðing um fartelefonir í bili og í november verða sett tænastugjøld í sjálva ferðslulógina, t.d. í sambandi við tænastur frá Bileftirlitinum.

Nýggj koyrikortarkunngerð og nýggj kunngerð um koyrilærarar koma í desember.

Kunngerð um bulvognar kemur í januar/februar, og kunngerð um sleip av akførum kemur februar/mars.

Vinnumálastýrið sigur, at arbeiðið at orða nýggja ferðslulóg fer at byrja skjótast møguligt.